# Hvussu gerst tekning arkitekturur?



**Í hesum døgum er arkitektadagur í Havn, har temaið er: Burðardygd, siðvenja og tøkni. Fyri meg sum arkitekt er tað spennandi, av stórum týðningi og ikki minnst stuttligt, at fokus verður sett á arkitektur sum heild. Temaði, ið valt er, er eisini áhugavert og relevant í hesum døgum, har nógv verður tosað um veðurlag og bygdað umhvørvið**

ARKITEKTURUR
*Meduna Dalsgaard, arkitektur A.F.*
*Við hollum stuðuli frá: Sissal Kampmann*

Eitt er hvat eg sum fakpersónur, sum arkitektur, haldi er spennandi og eitt annað er, hvat vanligi borgarin veit um arkitektur, sum í veruleikanum er ein stórur partur av tí dagligdegnum vit liva í og umgeva okkum við dagliga.

Spurningurin er stutt sagt hann, um hetta er eins innlýsandi fyri øll?

Fyri at kanna henda spurning nærri, havi eg hitt fýra fólk. Eg havi spurt tey ymiskar spurningar, ið snúgva seg um arkitektur, burðardygd, siðvenju og tøkni.

Tey spurdu vóru:

Beinta Vilhelmsen, skraddari og sjálvstøðug vinnurekandi.

Bjørg Dam, exportteknikari og sjálvstøðug vinnurekandi við sølu og marknaðarføring.

Una Nielsdóttir Galan, skúlanæmingur, gongur í 7. klassa.

Lea Kritindóttir Kampmann, skúlanæmingur, gongur í 7. klassa.

**1. Hvat er ein arkitektur?**
**Bjørg:** ein sum Meduna ella ein í rullukraga og svørtum brillum.
**Beinta:** Ein sum teknar hús, bygningar. Stólar o.a. brúgsting- inventar.
**Una:** Ein sum teknar hús. Veit ikki um teir gera annað.
**Lea:** Ein, sum teknar hús og avgerð hvussu vinklarnir skulu vera, og hvussu húsið sum tey skulu byggja skal síggja út.

**2. Hvat er arkitekturur? byggilist?**
**Beinta:** stórir officiellir bygninginar og hús tey ríku hava ráð til.
**Bjørg:** Ja, Sidney opera og norðulandahúsið.
**Una:** Tað veit eg ikki. Byggiliist???- veit stadigvekk ikki.
**Lea:** Eg havi hoyrt at arktekturur er hús, býir, bygningar, møbilarkitektar eru eisini. Byggilist er eisini hús, bygningar og alt tað.

**3. Hvat gera arkitektar?**
**Beinta:** teir tekna hús og tekna og tekna...
Bjørg: teir tekna og sniðgeva.
UNA: teir tekna.
Lea: Tekna hús og bygningar osfr.

**4. Nær hevur man brúk fyri arkitektum?**
**Beinta:** Tá man skal umvæla, táman skal byggja hús, sethús til tey ríki altso...kirkjur o.a. annað
Men annars eru ymisk sløg av arkitektum, anlegsgartnarum, landslags- og innretningsarkitektum.
**Una:** tá man skal byggja eitt nýtt hús. teir kunnu finna uppá góðar ideeir um hvussu tað skal síggja út.
**Bjørg:** tá man skal byggja nakað dýrt og lekkurt.
**Lea:** Td. Tá man skal byggja eitt hús ella ein bygning ella gera eitt serligt møbul.

**5. Hvørjum arbeiða arkitektar við?**
**Beinta:** teir hugsa um hvar vindeyguni eru, og tílikt. Sólargang og placering so man fær sum best burturúr - tá man sjálvur fer at biksa er nógv sum ikki verður hugsað um. proportiónir og linjur í ....teir hugsa um heildina. Sum at fara til skraddara og fáa seyma kjóla og skraddarin hugsar um at man hevur arr ella ov stóra bringu og ger snið sum passar til. Man kann ikki hava pikkulítla nalvablus til stóra bringu. Man hevur brúk serfrøðingum. Fólk hugsa tað er einki fyri men tað er tað...
**Una:** veit ikki.
**Bjørg:** Teir arbeiða við tusch og papír og AutoCad.
**Lea:** Teir arbeiða við at tekna hús, bygningar og tað sum eg havi nevnt fyrr.

**1. Hvat er burðardygd?**
**Beinta:** Flagtak.
**Bjørg:** prís ur og kvalitetur gongur hond í hond....sólorka...o.slíkt.
**Una:** veit ikki hvat tað merkir.
**Bjørg:** Tað optimala er ein krossskipan har prísur og kvalitetur møtast. Man fær meira kvalitet enn tú hevur givið pengar fyri. Eg vil ikki siga at arkitekturur er burðardyggur, tað man fær er eitt meirvirðið og er betri snið, lekkrari design, betri innrattað, betri ljós betri heild. Man verður glaðarari fyri tað í longri tíð. Tað er tað burðardygga.
**Lea:** Veit ikki.

**2. Hvat er siðvenja?**
**Beinta:** tað er ikki siðvenja at brúka arkitekt í FO. Her ger man tað sjálvur. Rættir føroyskir menn byggja sjálvir síni hús. og so kennir man onkran sum dugir at brúka eina lineal og sovorið.
Man skal hava stóra stovu til stórar føðingardegar, gestawc, gestaverisli, tá familjan kemur niðurifrá at leggja seg á húsini.
**Una:** stórt rúm til at halda fest í.
**Bjørg:** Er at øll skulu hava tað sama sum hini. Stóra stovu til stórar føðingardagar, 3 wc, hjall, garagu, træhús, og at gera alt sjálvur. Man veit best sjálvur.
**Lea:** Tað er td. Okkurt man ger umaftur og umaftur.

**3. Hvat er tøkni?**
**Beinta:** Veit ikki.
**Bjørg:** laptop og autocad. Bang og Olufsen.
**Una:** Veit ikki.
**Lea:** Td. Teknikkur er nógv. Td. teldur og annað tá tað er elektroniskur teknikkur. Men tað kann eisini vera nógv annað. Td. Teknikkur í at spæla tónleik.

**4. Hvussu setur man omanfyri í samband við arkitektur?**
**Beinta:** Veit ikki.
**Una:** Ah, eg slett veit ikki hvat tað er.
**Bjørg:** Nei, síggi einki samband.
**Lea:** Teknikkurin kemur inn í arkitektur, tá man skal duga at byggja og tekna hús og bygningar. Siðvenja kemur inn, tá man hugsar um, hvussu hús og bygningar plaga at síggja út. Veit ikki við burðardyggheit…

**1. Hvat er ein arkitektur?**
**5.Hvørjum arbeiðia arkitektar við?**
**Meduna:** Arkitekturin er ein fakpersónur, ið dugir og evnar at hugsa og tekna nýtt. Ein sum hevur listarlig evnir at sniðgeva, men sum eisini kennir alt til konstruktiónir, tilfeingi og veðurlag. Hetta krevur vitan og amboð.

Arkitekturin er ein, sum hevur gingið í skúla og lært. Tvs. ein fakpersónur, ið sum hevur lært, lisið og arbeitt við arkitekturi og byggilist.

Arkitekturin er ein, ið sniðgevur, ger karmar og leggur upp til ein aktivitet sum t.d. tað at búgva, at vera, at spæla, o.s.fr. í veruleikanum er.

Hesir karmar kunnu vera fysiskir eins og teir kunnu vera teoretiskir. Fysisku karmarnir kunnu vera alt tað, ið ber til at byggja frá sniðgeving, design, til stórar brýr og landsløg. Støddin á karmunum kunnu tí vera vera ymiskar.

Tosar man um teoretiskar karmar, hugsar man aloftast um ætlanir fyri einhvørjum arbeiðið, bygging ella sniðgeving. Tað kann eisini, sum fyrr nevnt vera í ymskum støddum.

Teoriin kann eisini snúgva seg um einhvørja meining, hugsan ella leist fyri, hvussu ein skilur og arbeiður sum arkitektur.

Ofta tosar man um at arkitekturin ger ella sniðgevur, skipar og skapar karmarnar fyri lívinum og tí eisini tilveru menniskjans.

Í byggigongdini, og tá talan er um bygging yvirhøvur, eru nógvir fakbólkar við í arbeiðinum, og arkitekturin er ein teirra. Tvs. arkitekurin arbeiðir saman við fleiri øðrum fakbólkum og fakpersónum.

Í hesum hópinum av fakfólki er arkitekturin tann, ið umboðar brúkaran; tvs. tey ella hann ella hon, sum skulu nýta bygningin ella búgva í honum.

Arktitekturin hugsar um, hvussu bygnigurin skal nøkta tørvin hjá brúkaranum. Tá talan er um arbeiði hjá arkitektinum, hugsa tey flestu um kreativa arbeiði: at tekna og arbeiðið við skitsum og modellum. Arkitektaarbeiðið hevur fleiri síður. Útyvir skapandi, kreativa partin av arbeiðinum, skal arkitekturin harumframt eisini samstarva og koma ásamt um kostnað við byggiharran, keyparan ella brúkaran. Umframt hetta, skal arkitkturin skilja arbeiði hjá entrepenøri og verkfrøðingi soleiðis, at hann hevur møguleika fyri at fylgja byggigongdini og samstundis tryggja, at brúkarin fær eitt gott úrslit og ikki minst góðan arkitektur.

**2. Hvat er arkitekturur?**
**Meduna:** Arkitekturur er karmarnir um lívið. Karmar, ið nøkta ymiskan tørv, so sum lívd, útsýni o.s.fr.

Ikki øll bygging kann sigast at vera arkitekturur. Arkitekturur kann eisini nevnast byggilist. Hetta kann skiljast, um vit leggja dent á byggiLIST.

Listin er á tí staði, har teori og praksis møtast. Í hesum møti skapast meirvirði. Tað er har ætlanin, funktión og endaliga úrslitið er væl samansjóða, og gevur eina væleydnaða heild.

Byggingin einsamøll kann skiljast sum ein minimumsloysn har bert tað mest neyðtuvrviliga er tikið hædd fyri. Arkitekturur bjóðar eitt meirvirðið, tvs. eina ávísa góðsku avtrat byggingini.

Arkitektur kemur av latíni, og merkir byggilist. Men arkitekturur er eisini býarplanlegging, landsløg, urtagarðar og parkir í stórum skala og design/sniðgeving av brúkslutum og smáum rúmum.

Arkitekturur verður ofta lýst sum ein bundin list, tí uppgávan er bundin. Arkitekturur verður skapaður fyri at nøkta ein praktiskan tørv, sum t.d. tørvin á einum staði at búgva ella einum staði at arbeiða. Saman við hesum er eitt listarligt mál tengt at arkitekturinum. Arkitekturur er arbeiði við